**Jørgen Niclasen**
**Landsstýrismaður**

**J.Nr.:** 14/00258-3

**Svar**

**upp á**

**skrivligan fyrispurning nr. 14/2014 eftir tingskipanini § 52a frá Kristinu Háfoss, løgtingskvinnu, um dupult skatting av pensjón hjá føroyingum, ið flyta uttanlands**

**Spurningurin var soljóðandi:**

1. Metir landsstýrismaðurin, at tað er nøktandi, at tað eru gingin nærum 3 ár, har føroyingar eru skattaðir við inngjaldi av pensjón, og somuleiðis skattaðir við útgjald av pensjón, um føroyskir pensjónistar eru fluttir til Danmarkar?

2. Hvørjar samráðingar standa fyri framman við onnur lond fyri at tryggja, at føroyingar ikki verða skattaðir dupult, um teir flyta til onnur lond?

3. Hvussu langa tíð metir landsstýrismaðurin tað fer at taka, at fáa líknandi avtalur við øll onnur lond?

4. Hvørji lond kunnu føroyingar flyta til uttan at verða skattaðir bæði við inngjald og við útgjald av pensjónum teirra í 2014?

5. Hvørji lond kunnu føroyingar ikki flyta til uttan at verða skattaðir bæði við inngjald og við útgjald av pensjónum teirra í 2014?

**Svar:**

**AD 1.**

Eg veit av royndum, at tá ið tað kemur til samráðingar um at broyta avtalur millum lond, so tekur tað sína tíð at fáa eitt gott úrslit. Eg eri væl nøgdur við avtaluna.

Eg havi ikki kunnleika til, at tað er komið fyri, at persónar, sum eru fluttir til Danmarkar eru skattaðir bæði við inngjald og útgjald. Er hetta hent, eiga hesir persónar sjálvandi at venda sær til TAKS soleiðis, at teir kunnu fáa føroyska skattin afturrindaðan, tí tvískatting eigur sjálvandi ikki at koma fyri, tá ein greið avtala fyriliggur millum londini.

**AD 2-5**

Millum tær skattaavtalur, sum Føroyar hava við onnur lond um eftirlønir, var tað einans danska

avtalan, sum tað var neyðugt at broyta. Tað er ikki neyðugt at broyta hinar avtalurnar. Hinar avtalurnar, ið Føroyar hava, og sum eisini fevna um eftirlønir, eru:

- Ísland (norðurlendski sáttmálin)
- Noreg (norðurlendski sáttmálin)
- Svøríki (norðurlendski sáttmálin)
- Finnland (norðurlendski sáttmálin)
- Grønland
- Stóra Bretland og Norður Írland
- Isle of Man
- Jersey
- Guernsey
- India
- Schweiz
- Bermuda
- Cayman Islands
- Bretsku Jomfrúoyggjarnar

Skuldi spurningurin um tvískatting komið upp í sambandi við, at føroyingur flytur til eitt land, sum Føroyar ikki hava avtalu við, má hesin trupulleikin viðgerast tá. Spurningurin um tvískatting kann koma upp, tá fólk flyta til eitt land, sum Føroyar ikki hava avtalu við, og fáa inntøku úr Føroyum. Spurningurin kann taka seg upp uttan mun til, um tað snýr seg um pensjón, sum er skattað við inngjald ella við útgjald, tí Føroyar fara ikki uttan víðari at siga skattarættin frá sær, talan er jú í flestu førum um inntøku, sum er forvunnin í Føroyum av persónum, sum hava verið fult skattskyldugir til Føroyar, og har Føroyar hava givið frádrátt fyri inngjøldini. Í so máta er onki broytt.

Føroyar hava í mun til støddina á landinum lutfalsliga nógvar avtalur. At hava avtalur við øll heimsins lond er onki endamál í sær sjálvum, og neyvan nakað land hevur avtalur við øll heimsins lond. Avtalur verða gjørdar, tá mett verður, at tørvur er á eini avtalu, og flestu framkomin lond hava – eins og Føroyar – reglur í egnari lóggávu, sum taka hædd fyri tvískatting í teimum førum, har sáttmáli ikki er gjørdur millum londini.

Fíggjarmálaráðið, 6. november 2014

**Jørgen Niclasen,**

fíggjarmálaráðharri